# Bleiv raktur av spjóti



Tað skal vera máti við at ganga høgt upp í sítt arbeiði. Myndamaðurin hjá dagblaðnum Ogden Standard Examiner, Ryan McGeeney, kom so nær, tá hann dekkaði skúlameistaraheitini í spjótkasti í statinum Utah í USA, at eitt viltfarið spjót rakti hann í beinið. Spjótið fór tvørtur ígjøgnum beinið beint undir knænum, men lukkutíð fyri hann rakti spjótið hvørki æðrar ella bein. Hendingin fór fram um vikuskiftið í býnum Provo. Ryan McGeeney varð fluttur á sjúkrahús, har spjótið var tikið burtur. Hann bleiv seymaður við 13 pentum. Sjálvur segði hann seg ikki fáa ilt av óhappinum og hann tók sjálvur mynd av hendingini.

# Mao bjóðaði USA kvinnur

Undir einnum samráðingum um handil í 1973, gav kommunistaleiðarin í Kina, Mao Zedong USA eitt rættiliga óvanligt tilboð: 10 milliónir kinesiskar kvinnur. Tað avdúka almannakunngjørd skjøl hjá uttanríkisráðnum í USA. – Vit hava ikki nógv, men vit hava eitt stórt yvirskot av kvinnum. So um tit hava áhuga kunnu tit fáa nakrar fáar – nakrar túsund, skal Mao hava sagt. Seinni hækkaði hann tilboðið til 10 milliónir kvinnur og vísti til, at tær fingu ov nógv børn. Amerikanski uttanríkisráðharrin, Henry Kissinger, skal hava svarað: Vit noyðast at kanna tilboðið nærri, skrivar mánaðarblaðið Histore.

# Gásapar skotið til stuttleika

**Djóni Zakaris Frýdal av Velbastað er mest sum skelkaður av, at nakar kann fáa seg at skjóta eitt gásapar við níggju smáum ungum, bara til stuttleika**

POLITIMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Djóni Zakaris Frýdal gjørdist illa við, tá hann um trítíðina í gjár fór at hyggja sær til gæsnar. Tí tær lógu báðar deyðar og allir níggju ungarnir burtur.

Djóni ringdi til løgregluna at boða frá, sjálvt um vónirnar kanska ikki eru tær størstu at finna tann ella teir seku. Løgreglan kom á staðið, og saman við eigaranum og blaðmanni og myndamanni hjá Sosialinum savnaði løgreglumaðurin tilsamans 10 patrónhylki saman. Eini tvey av hesum vóru ikki brostin.

- Hetta er helst hent í fyrrakvøldið, tí bæði gásapar og ungar vóru á lívi seinnapartin í fyrradagin, greiddi Djóni Frýdal løgregluni frá.

Ungarnir vóru bert fimm dagar gamlir, og tá eru teir prísgivnir, um gásaparið ikki er har at verja teir. Rovfuglarnir fara avstað við teimum.

- Tað er sjálvandi eisini ein møguleiki, at gerningsmaðurin ella –menninir hava tikið teir, men tað er meiri sannlíkt, at rov-fuglarnir hava fingið ein góðan bita, heldur velbastaðmaðurin.

Og tað kundi eisini verið líkt til, tí patrónhylkini sløgdust um eitt størri øki. Tað kundi sæð út til, at skjúttin er byrjaður uppi á sjálvum vegnum, og síðani hevur flutt seg 20-30 metrar oman í bøin. Á tí staðnum lógu fimm patrónhylki einar 10 metrar frá deyðu gæsnum.

Løgreglumaðurin helt, at talan helst hevur verið um eina »pumpgun« ella eina hálvautomatiska byrsu við fimm skotum.

Møguleikarnir at finna fram til teir seku eru ikki teir bestu. Einasti veruliga spor eru partónhylkini, sum kunnu geva løgregluni nøkur fingramerki. Men frægasti møguleikin er helst at spyrja í handlunum, sum selja hetta slagið av patrónum og so vóna, at tær eru nýliga keyptar og at krambafólkini kunnu peika á onkran keypara. Størsti møguleikin at koma víðari í málinum er kortini, um løgreglan fær hjálp frá almenninginum. So um nakar hevur varnast nakað óvanligt á vegastrekkinum omanfyri Velbastað í fyrrakvøldið, verða tey biðin at boða løgregluni frá á telefon 351448.



*Djóni Zakaris Frýdal við teimum báðum skotnu gæsnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Løgreglumaðurin við fýra av teimum tíggju patrónhylkjunum, sum funnin vórðu á staðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*


Keypssamtøkan í Hoyvík

Slaktarin í Hoyvík sóknast eftir

## *Fólki at pakka*



- at byrja 2. juni

Vit eru deild í einum størri virki, sum er í støðugari menning. Vit sóknast eftir einum kvikum og álítandi fólki, sum er lætt at vera saman við, at pakka vørur í slaktaradeildini

**Arbeiðstíð:** 36 tímar um vikuna.
Frí annan hvønn leygardag

**Løn:** Sambært S&K sáttmálanum

Hevur hetta tín áhuga hoyra vit fegin frá tær.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Lars Hansen, tel 314149 - 268049

**FK Hoyvík**
**Att. Lars Hansen**
**Brekkutúni 9**
**Postboks 349**
**FO-188 Hoyvík**


# Latið ei søguna doyggja

**Í Kvívíkar sókn er tikið stig til at skipa eina nevnd til at varveita fornminnir í sóknini**

FORNMINNI
*Tíðindaskriv*



*Gamla Pakkhús í Kvívík*

Í fyrstu atløgu er meiningin at varveita Gamla Pakkhús sum liggur í elsta partinum av Kvívíkini, upp at gamla Víkingagarðinum.

Gamlapakkhús er bygt aftaná at Einahandilin var avtikin og hevur verið ein av fleiri handlum í bygdini.

Millum annað komu skip frá Mortensen´s Handil á Kvívík at avskipa fisk, sum var virkaður í Gamlapakkhúsi.

Við hjálp frá Forngripasavninum og Føroya Fornminnisfelag, verður væntandi farið undir umvælingina longu í summar.

Tá ið hølisviðurskiftini eru til tað, verður savnað inn søguligt tilfar sum, so verða varveitt og sýnd fram. Í hesum sambandi verður heitt á fólk, sum liggja inni við søguligum tilfari, um so vítt møguligt at hýsa hesum so leingi.

Eisini síggja vit fram til at rúgvusmikla tilfarið, sum funnið er á Víkingagarðinum, kemur aftur til høldar í bygdini.

Hóskvøldið 22. mai klokkan 20 verður fundur í Glæmuni fyri at kunna meira um felagið, og um áhugi er, at fáa fólk at tekna seg sum lim í felagnum.